# <u>Føroysk jarðfrøðilig eyðkennir og nakrar avleiddar tulkingar (1)</u>

## Fyri umleið 56 milliónir av árum síðan lá eitt eftir føroyskum mátistokki heilt stórt vatn, har partar av Streymoynni nú liggja

Kanningar av pørtum av føroysku náttúruni, sum ikki hava lívrunnan uppruna so sum ymisk sløg av basaltiskum tilfari, kunnu ikki sjáldan geva ábendingar um viðurskifti viðvíkjandi teirra uppruna írokna møguliga samanseting av teirra keldutilfari í ovaru jarðarkápuni, teirra jarðfrøðiligu menning og so eisini, hvussu partar av tí føroyska økinum møguliga kunnu hava sæð út til ymiskar tíðir í landafrøðiligum høpi.

Føroyskar basaltiskar eindir, sum vóru kannaðar í samband við hetta 'innlegg' hoyra allar til tað lutfalsliga tunna <u>Sneisarfylkið</u> í teirri føroysku fláarskipanini, sum í sínum lag hevur mark við <u>Malinstindsfylkið</u> í neðra og <u>Ennisfylkið</u> í erva.

Eygleiðingar og mátingar, sum eru brúktar í samband við hendan tekst, eru millum annað gjørdar í økjunum við Egilsfjall í Ognarhaganum í Kvívík, við Sátuna omanfyri Leynavatn og so skamt niðanfyri/vestanfyri Gívrufjall, Bøllufjall og Árnadalstind (**Mynd 1**). Hesi økini eru serliga viðkomandi og áhugaverd tí <u>Sneisarfylkið</u> her ikki einans er uppbygt av gosgrýti, men eisini í stóran mun av legugrýti.




**Mynd 1**. Loftmynd frá 'Google Earth' yvir partar av Streymoynni. Økir, sum eru serliga viðkomandi, tá umræður tekstin í hesum innlegginum, eru avmarkaði við brotnum gulum linjum.




**Mynd 2**. 'Vanligar' myndir av Sneisarfylkinum, sum víst til í merktu økjunum frá Mynd 1. **a**. Útsýni í ein útsynning móti Sátuni, har Sneisarfylkið í stóran mun er bygt upp av ~12 m av Gosgrýti og ~12 m av legugrýti. **b**. Útsýni í ein landnyrðingnorðan móti Gívrufjalli og Bøllufjalli, har Sneisarfylkið í stóran mun er bygt upp av ~8 m av Gosgrýti og ~6 m av legugrýti. **c**. og **d**. Útsýnir í ein útsynning og í ein landnyrðingnorðan ávikavist móti Egilsfjalli, har Sneisarfylkið alt sum tað er, er bygt upp av ~12 m tjúkkum legugrýti.




**Mynd 3**. Nærri myndir av legugrýti hoyrandi til Sneisarfylkið á norðaru síðu av Egilsfjalli, sum víst til í Mynd 2c. **a**. og **b**. Útsýnir í ein útnyrðing og í ein landsynning ávikavist av teim niðastu umleið 7 – 8 metrunum av 12 m tjúkkari legugrýtislind. **c**. Nærri mynd av ovaru pørtunum av 12 m tjúkkum legugrýtishamara, har hetta er rivna til tynri fláir. Víddin á partsmynd **c** er umleið 2 – 2 ½ metrar.

Legugrýti talan er um í hesum økjum, er umleið 12 metrar tjúkt bæði við Egilsfjall og við Sátuna, meðan tað er nakað tynri (umleið 6 metrar) við Gívrufjall, Bøllufjall og Árnadalstind (**Mynd 2**). Tílíkt legugrýti er ikki altíð lætt at skilja frá vanligum føroyskum gosgrýti í landslagnum, men har hettar er rivna til tynri fláir er hetta lættari at eyðmerkja (**Mynd 3**).



**Mynd 4**. Nærmyndir av legugrýti hoyrandi til Sneisarfylkið á norðaru síðu av Egilsfjalli og á landnyrðings síðu av Sátuni. **a**. og **b**. Legugrýti á landnyrðings síðu av Sátuni líkist blandaðum grýti (‘Conglomerate’) í lendinum, men er einans bygt upp av fínkornutum tilfari (‘silt’), tá til stykkis kemur. Grátt grýti til vinstru er lutfalsliga óávirka av evnafrøðiligari niðurbróting (‘chemical weathering’) meðan reydligt grýti til høgru er meira ávirka. **c**. Ójøvn yvirflata av óávirkaðum legugrýti við Sátuna og **d**.skorin/saga grótroynd av sama. **e**. Ójøvn yvirflata av ávirkaðum legugrýti við Sátuna og **f**. skorin/saga grótroynd av sama. **g**. Ójøvn yvirflata av legugrýti við Egilsfjall og **h**. skorin/saga grótroynd av sama. Royndir undir **d**. (Sátan) og **h**. (Egilsfjall) eru heilt meinlíkar.




**Mynd 5**. Leyst legugrýtistilfar í oyggjalondum so sum tað (fyrrverandi og núverandi) føroyska verður í størstan mun ført við rennandi vatni og við aldum/streymi frá upprunaøkjum til økir har tílíkt kemur endaliga til hvíldar. Fyri tílíkan flutning er alment galdandi, at grovari tilfar steðgar har lutfalsliga nógvur streymur er, meðan fínari tilfar botnfellur har minni streymur er. Kornstøddir eru givnar upp í millimetrum.

Alt tað kannaða legugrýti á hesum 3 støðunum er rættuliga fínkornut 'silt' tilfar (**Mynd 4**), sum hevur kornstødd uppá 0,002 – 0,0625 mm. Vanliga verður rokna við, at tílíkt fínkornut tilfar er flutt antin við vindi ella við rennandi vatni og streymi. Í seinna førinum botnfellur tað so endaliga lutfalsliga langt frá landi á sjónum ella í onkrum vatni, har næstan eingin streymur er (**Mynd 5**). Tá tað føroyska økið upprunaliga var ein basaltiskur háslætti, sum helst hevði havøki rundanum (tvs. ein stór oyggj), so er mest sannlíkt, at 'silt' tilfar í hesum førinum bleiv flutt við rennandi vatni og streymi. Fyri hendan partin av tí føroyska økinum er tað mest sannlíkt, at nevnda legugrýti er komið til hvíldar á botninum á onkrum stórum vatni. Um hæddir (yvir sjónum) og hall á undirsíðunum av hesum 3 eindunum/økjunum við legugrýti verða 'ekstrapoleraðar'/'ekstrapoleraði' sínamillum, so passa hesi so mikið væl saman, at til ber við toluliga stórari vissu at staðfesta, at tey helst einaferð hava verið samanhangandi. Hetta merkir í sínum lag, at eitt og sama vatn helst einaferð hevur fevnt um alt hetta økið. Frá øðrum kanningum viðvíkjandi aldursáseting av føroyskum basaltiskum tilfari er greitt, at Sneisarfylkið, og harvið eisini nevnda vatn við legugrýti, er umleið 56 milliónir ára gamalt.

Tað er ikki óvanligt at rokna við, at tílíkt fínkornut tilfar botnfellir til eina samlaða tjúgd uppá umleið ein millimetur árliga ella umleið ein metur fyri hvørji 1000 ár. Harafturat kann tílíkt fínkortnut tilfar, tá tað er trýst saman til harðan klett, hava eina tjúgd sum er kanska so mikið sum ein triðing (1/3) minni enn upprunaligt leyst tilfar. Í Hesum førinum vildi tað so merkt, at upprunaliga tjúgdin av hesum 'silt' legugrýtinum við Egilsfjall og Sátuna helst hevur verið einar 18 metrar. Um rokna verður við at tjúgd á hesum legugrýti upprunaliga vaks ein metur árliga, so er talan um eitt tíðarskeið uppá eini 18000 ár ella meira, har einki gosvirksemi hevur verið í hesum økið og kanska heldur ikki aðra staðni í føroyska økinum.




**Mynd 6**. Partsmyndir vísa til økir hoyrandi til Sneisarfylkið frá Mynd 2a, b., men við stytri frástøðu. **a**. Útsýni í ein landsynning á landnyrðingssíðuni av Sátuni vísir gosgrýti og legugrýti (og nakað av vallaðum lendi) hoyrandi til Sneisarfylkið, sum her er eitt slættlendi. **b**. Útsýni í ein útnyrðing á útsynningssíðuni av Gívrufjalli, Bøllufjalli og Árnadalstindi vísir gosgrýti og legugrýti (og nakað væl av vallaðum lendi) hoyrandi til Sneisarfylkið, sum her er eitt vítt slættlendi. c. Útsýni í ein landsynning á útsynningssíðuni av Gívrufjalli, Bøllufjalli og Árnadalstindi vísir gosgrýti og legugrýti (og nógv av vallaðum lendi) hoyrandi til Sneisarfylkið, sum her er eitt rættuliga vítt slættlendi .

Botnur av hesum fyrrverandi vatni kann í dag síggjast sum víðar fløtur á landnyrðings-síðuni av Sátuni og á útsynningssíðuni av Gívrufjalli, Bøllufjalli og Árnadalstindi (**Mynd 6**).




**Mynd 7**. Loftmynd frá 'Google Earth' yvir partar av Streymoynni. Kannaði økir við'silt' legugrýti eru avmarkaði við brotnum gulum linjum, meðan møgulig landafrøðilig útbreiðsla av einum stórum vatni fyri umleið 56 milliónir av árum síðan er avmarkað við tjúkkari brotnari bláari linju.

Ein neyvari lýsing av tí føroyska Sneisarfylkinum í teirri samlaðu føroysku fláarskipanini (Sum hesin tekstur byggir á.) finst á leinkju: **https://doi.org/10.13140/RG.2.2.22789.10728** (Hendan grein um Sneisarfylkið, sum leinkja vísir til, bleiv annars uttan víðari útihýst frá seinastu útgávu av 'Frøði' uttan nakrar nøktandi grundgevingar. Tað er heilt eyðsýnt, at 'skrivifrælsi' í Føroyum ikki er galdandi fyri allar føroyingar, nú vit skriva 2026.).

Jógvan Hansen, Dr.Phil.Geol.